## Skriðulop á Múlavegnum



Seinnapartin var mangt sum bendi á, at vegurin til Viðareiðis fór at verða stongdur. Áirnar fóru upp um vegbreytina, eins og vandi var fyri skriðulopi. Tann sjey kilometrar langi Múlavegurin var kortini hann, ið veruliga merkti til áarførið. Seinnapartin í gjár varð hann nevniliga stongdur fyri allari ferðslu, orsakað av einum skriðulopi. Her var eitt rættiliga stórt lop farið, omanfyri landsvegin og allan vegin til havs. Eingin skaði hendi tíbetur, helst tí at ferðslan er rættiliga avmarkað eftir hesum vegastrekkinum. Í gjárkvøldið boðaði Landsverk frá, at koyrilíkindini á Viðareiðisvegnum vóru góð aftur, men at Múlavegurin framvegis var stongdur.

## Brendi seg í heitari keldu

Tey, sum hava verið í Íslandi og hava vitjað tær heitu keldurnar, vita, at vatnið har er kókandi heitt. Tað visti ein spanskur ferðamaður eftir øllum at døma ikki, tá hann í gjár steig út í eina av teimum heitu keldunum nærhendis teirri kendu Geysir. Íslendsku bløðini skriva, at maðurin stóð upp undir øklar í tí glóðheita vatninum og at hann mátti alt fyri eitt flytast á skaðastovuna á Selfossi, har ahnn fekk viðgerð fyri brunasárini.

# Deyðshjól í átta metrar hædd

**Í næstum fáa tey sirkus-hugaðu vitjan av Cirkus Baldoni, sum fer at hava seks framførslur kring landið. Her verður nógv spennandi at uppliva og síggja hjá børnum og vaksnum**

SIRKUS
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Mong eru tey, sum hava verið til sirkus-framførslur í útlondum. Men tað er ein meiri rár hending at møguleiki er fyri hesum á heimavøll.

Cirkus Baldoni úr Danmark kann nú bjóða familjuni til eina spennandi uppliving við stuttleika, spenningi og framúr undirhaldi í Klaksvík, á Giljanesi, Vági, Tvøroyri og í Havn.

Frá mánadegi 1. september til mikudagin 16. september verður møguleiki fyri at uppliva eina tveir tíma langa sýning í góðum sirkushuglagi við manesju, palltjøldum við leiktjaldi, beinkjum og ikki minst ljósi og ljósútbúnaði.

Millum tey spennandi tiltøkini verður á fyrsta sinni í søguni hjá Cirkus Baldoni møguleiki at uppliva eitt spennandi deyðshjól. Her fer sirkusleikarin at renna ovast uppi og inni í einum risastórum metalhjóli, sum melur heilt upp í 8 metra hædd.

### Tvíburahópur úr Kina

Eitt annað innslag í longu skránni er GaoChen-hópurin, ið fer at hava eina akrobatiska fylkingarframførslu, sum hann fekk heiðursløn fyri á sirkusfestivalinum í París.

At gera akrobatikk í slowmotion er sera trupult, og tað krevur týðandi kropsstyrki. Her eru rástyrki og yndi sameind í eini yndisligari framførslu.

Í hópinum eru tvinnir tvíburar, sum eru giftir hvør við øðrum. Øll hava slitið barnaskógvarnar í kinesiska Statssirkusinum og hava síðan ferðast runt bæði í Asia, Amerika og Evropa. Chenbrøðurnir hava eitt nú framført í tí víðagitna Cirque de Soleil. Gao-systrarnar standa í Guiness Book of Records við einum av sínum javnvøguframførslum.

GaoChen-hópurin fer eisini at vísa tann sermerkta leyvudansin saman við eini diabolo-jonglering.

### Stuttligir akrobatar

Tað er altíð stórur fagnaður, tá ið Freddi Steckel og Thessa Daniella úr Danmark blaka seg sjálv og hvørt annað út í eina cascadeur-framførslu.

Henda framførslan er á tremur við sínámillum argi og misskiljingum, har ið tey gloyma at lofta hvør øðrum, missa hvørt annað og glíða undir og oman á hvørt annað.

At súkkla duga øll. Men til at halda javnvágini krevst meira enn bert at taka stuðulshjólini burtur. At halda javnvágini á eini súkklu í 3 metra hædd á tveimum bóltum uppi á einum stætti er ein avbjóðing, sum bert tey fægstu munnu megna.

Sjálvandi eru eisini klovnar, sum fáa bæði stór og smá at flenna í kíki, og tað er í tí sermerkta crazy stílinum, sum eyðkennir Cirkus Baldoni.

Gjøgnum alla framførsluna roynir klovnurin Danilo at tekkjast sirkusstjóranum fyri at vísa, at hann er ómissandi, og saman við Ib Ibbermand arga teir Thomsen manesjutænara, sum stríðist fyri at halda skil á, men tað nyttar lítið.

Á skránni er eisini ein framlig og talandi leyva, Leonardo, sum er kelivættið hjá børnunum. Hon elskar at arga Baldoni sirkusstjóra.

Sagt verður, at Cirkus Baldoni hevur sett sýningina soleiðis saman, at børnini ikki keða seg og tí hava bindindi at sita. Kunnað verður um framførsluna á donskum og enskum við stuttligum viðmerkingum á landsmálinum.




*Bæði børn og vaksin kunnu gleða seg til eina spennandi framførslu, tá Cirkus Baldoni vitjar í næsta mánaði*

# Magni vil ikki tiga

Heimamissiónsforlagið gevur í hesum døgum út tvær savnsfløgur við Magna Christiansen.

Allar fløgurnar, uttan jólafløgan, sum fyrr eru útkomnar við Magna Christiansen, eru nú savnaðar á tveimum fløgum við heitinum “Eg vil ikki tiga”.

Á fløgunum eru 43 sangir, og kosta tær 199 krónur.

Fløgurnar kunnu keypast á heimasíðuni hjá Heimamissiónsforlagnum www.hmf.fo, ella við at ringja til Heimamissiónina tlf. 470000 og á vanligu støðunum runt landið.

sb.




*Øll løgini við Magni Christiansen verða nú savnaði á tveimum fløgum*